LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, við Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

GÓÐ DEKK BÍLIGA TIL SØLU
Lítið brúkt summardekk 185/65-14 bíliga til sølu fyri 350 kr. pr. stk. Nýprísur 4000 kr. samla. Passar til teir flestu bilar.
Tlf. 310061 ella. 265835

TOYOTA COROLLA 1.6 XL
til sølu, hevur 15" sportfelgur, tokulyktir framman, senkaður framman, árg. 89, koyrt 169.000 km, svartur.
Tlf. 222238

KØLI- FRYSTIVOGNAR
til sølu: Man 24-372, Man 19-322, Mercedes 2534, VW LT35.
Tlf. 222774

SPORTFELGUR
Fýra sportfelgur til Ford Escort bíliga til sølu.
Tlf. 311851 ella 284210

VW TRANSPORTER
við last, árg. 98 til sølu.
Tlf. 211062 ella 0045 22479170

DAIHATSU CHARADE
G100, árg. 87, góðkendur sýn 3/02 í góðum standi. Moguliga gamal bílur kann ganga í keypi.
Tlf. 228347

FORD ESCORT 1.3 SAVOY
3 hurðar, árg. 87 til sølu. Hevur brotnan drívaksul. Prísuppskot: 3.000 kr.
Tlf. 222098 eftir kl. 17

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

Til frímerki
Sosialurin
Lýsingartorgið
Box 76
110 Tórshavn

TOYOTA CAMRY 2.0 GLI
árg. 87, til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 251280

OPEL KADET
til sølu fyri 4.000 kr. Bilurin er frá 87, hevur nakað av rusti, men annars í góðum standi. Einans koyrt 96.000 km.
Tlf. 315318 ella 253318

VOLVO 740
árg. 87, nýsýnaður, hevur sportfelgur og sóltak, er í góðum standi, til sølu.
Tlf. 254201

OPEL ASCONA 1.6
árg. 87 til sølu. Bilurin koyrir sera væl, men krevur ábøtur.
Tlf. 254201

YNSKIST
Alufelgur, ið passa til Toyota Corolla, ynskjast bíliga til keyps.
Tlf. 314898

TOYOTA CAMRY 1.8 DX
árg. 87, koyrt 205.000 km, verið til sýn 23.5.2002. Prísuppskot 18.000 kr.
Tlf. 421211

AUDI 80 S
frá 88, til sølu til hægstbjóðandi. Bilurin er myrkabláur og sær gott út, men hevur defektan gearkassa. Nýtt JVC anlegg í bilinum.
0045 20872476 ella 457895

WV GOLF
Silvurgráur, árg. 88, nýggjar sportsfelgur, nýsýnaður - ongan kross, til sølu fyri 30.000 kr.
Tlf. 449088 - 260220

MOTORAR
Tveir Mazda 323 1,6i turbo, árg. 87, bíliga til sølu. Báðir hava brek, og ein Mitsubishi Lancer 1,8 diesel, árg. 87, bíliga til sølu.
Tlf. 223021

TOYOTA COROLLA 1,6
Lift back, árg. 87, til sølu. Prísuppskot 3.000 kr.
Tlf. 444534

TIL SØLU
VW transportari frá 86, bensin motor, skal til sýn og hava nýtt útstoyt, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 332144 / 210144

TOYOTA CARINA
sýnaður í oktober 01, ongan kross, koyrir væl, bíliga til sølu.
Tlf. 213787

PEUGEOT 106 1.5 DIESEL
árg. 1997, eyka sett av felgum við pikadekkum, Sony cd-anlegg, 4 JBL hátalarar + Pioneer forsterkara við. Ótrúliga økonomiskur.
Tlf. 224497

SPORTFELGUR
Fýra sportfelgur við góðum Good Year dekkum – passa til Ford Escort og Mondeo.
Tlf. 224534

FORD ESCORT 1.4
árg. 86, í góðum standi bíliga til sølu.
Tlf. 262545

FORD MONDEO 2.0i
92.000 km, el-rútar, -spegl og - sóltak, Anti spin, sportfelgur, hita í setrinum framman, árg. 95, sær sera gott út. Hægsta boð.
Tlf. 252506

TOYOTA COROLLA 1.3 XLI
árg. 91, 133.000 km, bíliga til sølu.
Tlf. 219468

HONDA CIVIC 2.6 LSI
Árg. 92, til sølu. Bilurin er senkaður, hevur sportsfelgur, el-rútar, el-spegl, sentrallás, vel og cd-anlegg við forsterkara og subwoofara. Nýlakeraður, svartur.
Tlf. 212717

EYKALUTIR
til BMW 318 TDS, árg. 96, til sølu.
Tlf. 218778

FÝRA SPORTSFELGUR
v/ góðum Good Year dekkum til sølu.
Tlf. 224534

FORD ESCORT 1,6
til sølu. Árg. 7/97, 5 hurðar. Bilurin er reyður, væl viðfarin og í finastaa standi. Hevur t.d. nýggjar bremsur og nýggj dekk.
Tlf. 223366 ella 316814

HONDA ACCORD
frá 12. mánaða í '87, í góðum standi, til sølu.
Tlf 217170

BÍLIGAN BIL? HYGG HER
Opel Kadett 1.3 SL . Nýsýnaður, tvær hurðrar, nýggja kobling, bremsur og karburator, 7000 kr.
Tlf. 214470 e.kl.16:15

FIAT CINQUECENTO 1.1
Sporting, árg. 08/95, gulur, koyrt 103.000 km. Sera væl hildin (penur) el-rútar, Central lás, CD-avspælara, 14" Sportfelgur við nýggjum Pirelli heilársdekkum. Sera økonomiskur. Til solu fyri 43.000,-
Tlf. 321466 – 223468

NÓGVIR PLÁTU-
og mek. deilir til sølu til Honda Acoord, árg.87-89.
Tlf. 219005/449005

NISSAN SUNNY 1.6 SLX
árg. 89, í góðum standi, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 317180 / 217180

BILUR YNSKIST
til láns frá 17.6. til fyrst í september.
Tlf. 0045 86140734 / 0045 22355417

TIL SØLU
Bagaguberari við kurv til Peugeot 106 til sølu fyri 1.000 kr. Bert brúktur eina ferð.
Tlf. 313282 & 318207

TOYOTA HIACE
diesel, árg. 87, koyrt 150.000 km, til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 372199

DEKK
Fýra Pirelli P6000 dekk, 195/65 R15, koyrt 600 km, til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 265409

TOYOTA COROLLA 1.3
Galla myrkagrønur við sóltaki, sportfelgum, pikadekk á felgum fylgja við. CD-spælari. Hevur koyrt 98.000 km, í finasta standi til sølu fyri 70.000 kr.
Tlf. 310797

OPEL ASCONA C
frá 1986, bíliga til sølu, prísuppskot: Uml. 10.000,-
Tlf. 214461

SPORTFELGUR
4 aluminiumssportfelgur 14" til Peugeot 206, lítið brúktar, til solu fyri 4.000 kr.
Tlf. 441634

YNSKIST
Jeepur ynskist til keyps. Patrol ella Land Cruiser, skal helst vera í góðum standi. Vinarliga ring á
tlf. 227089, Rógvi

TIL SØLU
Bláur Toyota Corolla 2,0 D, árg. 98, í góðum standi, til sølu fyri 115.000 kr.
Tlf. 221304 ella 228227

GÓÐUR DIESELBILUR
Ein Citroën Xantia 1,9 DT, í sera góðum standi, til sølu. Bilurin er frá aug. 97, hevur koyrt 114.000 km.
Tlf. 444700 ella 211512

YNSKIST
Eg eigi ein svartan Ford Fiesta frá '88 og eg havi tørv á einari vinstru hurð. Um tú eigur eina til mín, vinarliga ring
Tlf. 224594

FORD ESCORT 1.6i
árg. 92, 5 h, koyrt 135.000 km er nýsýnaður, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 218778

TOYOTA CARINA II
model AJ 151 L, árg. 84. Km 122.850, 5.000 kr.
Tlf. 421040

SPORTSFELGUR
2 pør av 15" sportsfelgum v/ dekkum á til sølu fyri 2.500 kr. stk.
Tlf. 319378 ella 258793

OPEL ASTRA
árg. 95, til sølu fyri 40.000 kr.
Tlf. 423236

ELLISAKFAR TIL SØLU
Ein Ford Capri 1970 er til sølu. Bilurin hevur koyrt 40.000 km - altið koyrt í Føroyum. Bilurin koyrir, men honum tørvar smávegis ábøtur. Upprunaligu nummarplátturnar eru skúrur. Eykalutir fylgja við.
Tlf. 452098

TIL SØLU
Ein Ford Escort 1.6 Ghia, árg. 87, og ein Ford Escort 1.6 Savoy, árg. 87, til solu fyri 1.500 kr. stk. sum eykalutir.
Tlf. 423236

Amboð

YMISK BRÚKT AMBOÐ
til sølu. So sum seympistól, blandimaskina, kompressari o.a.
265828

MASTER
- hitaovnar
· Hitakanónir
· Gasovnar
· El-hitaovnar
· Infrareyðir ovnar / sólir
· Avfuktarir
· Hitablásari til turking av grasi - serframleitt til Føroysk viðurskifti
Kaj Andreasen & Co
Tel. 315600 - Fax 318008

Arbeiði

TILBOÐ YNSKIST
upp á at skita klædning á eldri sethúsum í Rituvík.
Tlf. 214727

URTAGARDSARBEIÐI
Søknast verður eftir tilkomnum fólki at sláa gras í einum garði í summar, nakrir tímar um mánaðin.
Tlf. 319218 eftir kl. 18

AU-PAIR Í ÍSLANDI
I would like to hire an AuPair for next fall – from august 2002 to july 2003. Female, age 18-21 years, non smoker, has to have a drivers licence – who would like to live with an Icelandic family for at year, can apply. The job is to babysit 3 children (ages 8, 2 and 3) and help around the house, occational babysitting in the evening. We live in Kopavogur in Iceland. Please e-mail us: sting@tal.is or phone call
354-564-6484, Steina

FLISER
Pensionist søger mindre indedørs flisearbejde.
Tlf. 228058

SØKT VERÐUR EFTIR
kvinnu at gera reint 3 tímar fyrrapart hósdag ella frigjadag.
Tlf. 313304

ARBEIÐI YNSKIST
Ungur maður ynskir arbeiði í Havn.
Tlf. 264537 ella 361452

TILBOÐ YNSKIST
uppá liðugtgerð av túni, at stoypa bilhús og spekka garð.
Tlf. 332884

HÚSPLÁSS
Rosk og álítandi genta søkist til húsplass á hendingarikum staði. Má helst hava koyrikort. Løn eftir avtalu. Vinarliga ring
tlf. 328089

Barnaansing

ER NAKAR
ið tímir at ansa eftir lítlu, 1 ára gomlu Vár uml. 8 tímar um dagin frá 1. juni.
Tlf. 316706 ella 216990

Barnaútgerð

COMBI BARNAVOGNUR
Hvitur Brio Combi barnavognur (sky look) til solu. Skylook koyriposi, eisini Brio, fylgir við.
Tlf. 31084 ella 261686

SIMO STÓLUR
Vælhildin 2 1/2 ára gamal myrkabláur Simo stólur, model 417, til solu fyri 2000,- nýprísur 4500,-
Tlf. 321430

BARNAVOGNUR
Svartur barnavognur av slagnum »Basson« við lufthjólum til solu. Lyft og taska fylgir við. Sera vælhildin, til solu fyri 2.600 kr. (Nýprísur 4300,-)
Tlf. 322371

KOYRISTÓLUR
Brio koyristólur við føroyskum skinnposa til solu fyri 1.000 kr.
Tlf. 226220

BILSTÓLUR
Baby one bilstólur, 0-15 mòr., til solu fyri 300 kr.
Tlf. 226220

SIMO BARNAVOGNUR
1 ára gamal Simo barnavognur v/ luft í hjólunum + Simo babylyft til solu fyri 4.500 kr.
Tlf. 226220

SIMO BABY-POSA LYFT
Lætt at bera og kann seinni brúkast sum koyriposi til koyristól til solu fyri 700 kr. Snugliposi fyri 200 kr.
Tlf. 319577

VOGNAR TIL SØLU
Ein stórur Brio vognur, brúnur/puntutur, v/ tasku, regnskjóli og lyft til solu fyri 2.000 kr. Nýprísur 5.000 kr. Ein heitur, bláur Brio sitivognur fyri 2.000 kr. Nýprísur 4.000 kr.
Tlf. 252393 ella 322249

TIL SØLU
1 bilbarnastólur til solu fyri 300,-. Tvey lítið brúkt bilbarnasetur til solu fyri 100,- hvørt.
Tlf. 373856

TIL SØLU
Ein svartur Silvercross barnavognur v/ madrassu, kurv, regnslagi, seingjarsetti, dýna og koddi til solu fyri 3.700 kr.
Tlf. 260238 - 448439

TIL SØLU
Gráur barnavognur av slagnum Basson v/ lyft, puslitasku, dýnu+kodda, flugunet og regnslag, sær út sum nýtt, alt er knapt 2 ára gamalt.
Tlf. 441216 ella 253933

MYRKABLÁUR
vælhildin Brio barnavognur árg. 1999, til solu fyri 1.200,- Regnslag fylgir við.
Tlf. 217292 ella 457292

TIL SØLU
Koyristólur av slagnum Jalsøe, 350 kr. Hvitt stálportur, kann regulerast, 350 kr.
Tlf. 317273

BRITAX BILSTÓLUR
upp til 13 kg, til solu fyri 500 kr.
Tlf. 319172

BABYSTÓLUR TIL BIL
Ein brúktur, men góður stólur til solu fyri 150 kr.
Tlf. 314624 ella 215353

BARNAVOGNUR
Ein Silver Cross barnavognur til solu, bert brúktur itl 1 barn, sær út sum nýggjur. Prísur 3.000 kr. Nýprísur 5.000 kr.
Tlf. 422045

Bátaútgerð

YNSKIST
6-mannafar úr glasfipur ynskist til keyps – gjarna við ongum motori og uttan útgerð.
Tlf. 447234

TIL SØLU
Stórt 7 mannafar við fiskiloyvi til sølu. Krevur ymiskar ábøtur. Fiskiloyvi og bátur kann seljast hvør sær.
Tlf. 228217

YNSKIST TIL KEYPS
Neyst í Trongisvági / Tvøroyri ynskist til keyps.
Tlf: 371873 Bergur

BÁTUR TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, er ein vælútgjørdur seksæringur í góðum standi til sølu. Báturin hevur fiskiloyvi.
Tlf. 262733

BÁTASPÆL
Bátaspæl til solu.
Tlf. 370216 ella 218216

TIL SØLU
Bátamotorur av slagnum Arona 32 HK við geari, er væl hildin, hevur koyrt problemfrítt.
Tlf. 226250

MASKINBÁTUR
6-8 mannafar ynskist til keyps.
Tlf. 211604 ella 321471 e. kl. 17

Bingo

TVØROYRAR KLUBBI
hevur bingo 25. mai kl. 20. Minna eykaspælið endar.
Nevndin

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
hevur bingo í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 29. mai kl. 18.00.
Nevndin

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í skúlahøllini tórskvøldið 20. juni kl. 19. Góðir vinningar sum altið. Á lutaseðli 2 ferðir 500 kr.
Tvøroyrar Svimjifelag

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtiðini onsdagin 12. juni kl. 19.30. Harmonikuferð verður at vinna.
Kirkjukórið Ljómur

KAGGIN!
Gott bingo verður leygarkvøldið 1. juni kl. 19.00. 15 Vinningar á lutaseðli, m.a. tvey gávukort á 1.000 kr. Eisini verður spælt bingola og 20 kr. spæl. Ágóðin fer óskerdur til bridgelandsliðið, sum luttekur í EM í Italia í juni.
Kaggin

GOTT BINGO
verður í Tarvsmannafelagshúsinum. J. H. Schrødersgotu 9 mánakvøldið 27. mai kl. 19.00. Full pláta 400 kr. 6. og 12. spæl 600 kr. Nógvir góðir vinningar, m.a. á lutaseðli 2x1000 kr., 2x500 kr. 15 plátur fyri 100 kr. Eykaspæl aftaná. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Spastikarafelagið

TÓRSHØLL
Gott bingo verður leygardagin 25. mai kl. 20.00. Hetta er seinasta bingo fyri summarsteðgin. Øll eru vælkomin.
Tórshøll

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður leygardagin 25. mai kl. 19.00. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort frá Smyril Line á 2.500 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum hóskvøldið 30. mai kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar. Á lutaseðli m.a. balja full av mati og ferð fyri tvey við Norrønu til Bergen og aftur. Millumspæl, eykaspæl, koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-stuðlar

HEIMA BINGO
hjá Báruni fæst til keyps á Posthúsinum og í sølubúðunum og tú sært beinanvegin, um tú hevur vunnið. Heimabingo kanst tú spæla hvønn dag, og tú avger nær tú spælir. Má roynast.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

GOTT BINGO
Verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 17. juni kl. 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður ímillum spølini. Høvusvinningur á lutaseðli gávukort á 1000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

GOTT BINGO
Verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 27. mai kl. 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1.000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

BØKUR TIL HH TIL SØLU
Ymiskar bøkur til HH til solu bíliga.
Tlf. 252711

Burturm. /funnið

BURTURMIST
Myrkagrá Ericsson T29 fartelefon mist í Havnini. Møguligur finnari ring
317540

FARTELEFON FUNNIN
Ein Ericsson fartelefon T68, funnin í gongugøtuni í Havn 8. mai. Eigarin biðist venda sær á
nr. 448033

BURTURMIST
Lítil ljósabrún ullint hondtaska við einari Nokia 3310 í, burturmist við Steinatún 18/5-2002. Telefonin er ljósagrá við latin motivum á. Møguligur finnari
ring 421361

SEIKO UR MIST
í býnum leygardagin. Møguligur finnari ring
Tlf. 214240

HEVUR TÚ
borið eyga við ein gráspurv við litringum á, so vinarliga ring á
tlf. 315230 ella 255937

Býli

ÍBÚÐ ELLA STÓRT KAMAR
Ungur maður søkir íbúð ella stórt kamar í Tórshavn sum skjótast.
Tlf. 316490

ÍBÚÐ Í HAVN TIL LEIGU
Fult møblerað 3 ver. íbúð til leigu til ikki-roykjara frá uml. 1. juli og uml. 1 ár fram. Prísur kr. 5.000,- + el. Svar verður einans sent tí, ið fær íbúðina.
Bill.mrk. 1345-2

GOYMSLURÚM YNSKIST
til leigu – 80-100 fermetrar, við góðari tilkoyring.
Tlf. 313799 ella 221158

KAMAR TIL LEIGU
á Argjum við atgongd til wc, vaskimaskinu, køk, stovu og sjónvarp frá 1. juni.
Tlf. 213571

ÍBÚÐ SØKIST
Íbúð søkist í Klaksvík til gentu, ið fer væl um.
Tlf. 252610

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungur maður søkir íbúð í Havn. Eg eri útbúgvin snikkari og havi fast starv. Eg eri áhugaður at gera ábøtur við íbúðina um neyðugt er.
Tlf. 226470

ÍBÚÐ YNSKIST
24 ára gomul hárfriðkanarkvinna søkir íbúð í Havn skjótast til ber. Royki ikki.
Tlf. 0045 32876286 ella 0045 26271641

6 PERS. SOMMERHUS
nær skov og strand, ved Hirtshals billig til leje. Ring vedrørende pris og frie uger efter kl. 18.00.
Tlf. 0045989975460 / 004521760211

HÚS ELLA ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Tórshavnar kommunu skjótast gjørligt. Vit eru eitt par við einum barni, ið skal í fyrsta flokk í Eysturskúlanum í summar. Vit fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 315913

ÍBÚÐ YNSKIST/HEVUR SKUND
Par, bæði hava fast starv, við einum barni ynskir íbúð í Havn ella nærhendis. Verða heimleys 1. juni. Um tú vil hjálpa okkum, lova vit at hjálpa tær.
Tlf. 211981, Guðrið

HJÁLP!
Ungt par í Klaksvík søkir eftir íbúð skjótast gjørligt. Um tú hevur ella veit um onkra, vinarliga ring
Tlf. 250242 ella 250828

HÚS Í FUGLAFIRÐI
til sølu, um nóg høgt boð fæst. Tey eru í trimum hæddum og standa í barnavinarligum umhvørvi.
Tlf. 444012

UMBÝTI
Eitt gott 300 fermetrar grundøki við góðum útsýni, í Hoyvíkshaga í HAVN, ella eitt sera gott grundøki í SALTANGARÁ við fríum útsýni yvir Skálafjørðin - at býta við grundøki í Tórshavnar kommunu.
Ring á telefon 265835

BÝTA UM?
Er nakar, sum hevur eina ov stóra íbúð og vil hava eina minni og bíligari, so ynskja vit at býta um. Tlf. 313383 (e. kl. 17) ella
ingij@kallnet.fo

NÝGGJ HÚS Í HOYVÍK
til leigu til fólk, ið fara væl við. Húsini eru 102 fermetrar í einari hædd og hava m.a. trý kømur.
Tlf. 315738

ÍBÚÐ SØKIST
Vit eru tvey á 26 og 32 ár, ið søkja eftir íbúð í Tórshavn-økinum skjótast gjørligt. Bæði hava fast arbeiði og fara væl um.
Tlf. 251106 og 261106 eftir kl. 17

KAMAR
Kamar við atgongd til brúsu ynskist í Havn.
Tlf. 264537 ella 361452

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig mamma við trimum børnum ynskir íbúð í Klaksvík skjótast gjørligt.
Tlf. 254862

OGN TIL SØLU
Ogn í Vági til sølu.
Tlf. 217335 ella 373681

TVÆR VIKUR Í ODDER?
Eini fult møblerað sethús í Odder , 160 kvm, við stórum hava til leigu frá 20. juli til 3. august. Bert 5 minuttir við bili til eina av bestu strondum í Danmark, Saxild Strand og bert 15 minuttir við bili til Århus.
Tlf. 0045 86544164

HÚS Í HAVN TIL LEIGU
Frá 1. august 2002. Miðskeiðis í Havn, tvær hæddir, stórur havi, stova, køkur, 4 sovikømur, 1 baðirúm við wc, 1 wc, vaskirúm, allir hentleikar o.s.fr. Partvis møblerað um tað ynskist. Leiga: 8.500 kr. um mór. + ljós og hita.
Skriva til husihavn@post8.tele.dk

KAMAR Í VESTMANNA
Friðarligur drongur, sum skal byrja á Fiskivinnuskúlanum í august, søkir eftir kamari í Vestmanna.
Tlf. 455425

ÍBÚÐ SØKIST
Kvinna við einum skúlabarni søkir íbúð í Havn. Eru friðarlig og fara væl um
Tlf. 255212

ÍBÚÐ Í EINA VIKU
í Keypmannahavn ynskist til leigu frá 9.-16. august. Vit eru 2 vaksin og 2 børn (4 og 16 ár), sum fara væl um.
Tlf. 311747 ella 256887

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig mamma við tveimun børnum søkir íbúð í Tórshavn frá hálvum juli. Max pris 5000/mór
Vinarliga ringið +45 24805506

TVØROYRI
Skulu tygum til Suðuroyar og vilja búgva væl, so er hús í miðbýnum til leigu vikuskifti ella longri, sera vakurt útsýni yvir Tvøroyrarfjørð.
Tlf. 312205 ella 261560

ÍBÚÐ/SUMMARHÚS YNSKIST
Par við einum 4 ára gomlum barni ynskir at leiga eina íbúð/hús uttan fyri Kbh. í uml. 2-3 vikur, frá 3. juli og fram. Má vera í barnavinarligum umhvørvi. Vit eru friðarlig og fara væl um. Tlf. 252783 ella skriva til
halldora20@hotmail.com

ÍBÚÐ Í KBH. YNSKIST
Par við einum 4 ára gomlum barni leitar eftir íbúð í Kbh. í summar frá 4. juli til 13. juli. Vit fara væl um og eru friðarlig. Alt hevur áhuga.
Tlf. 252783

BÝLI
Er onkur, sum ætlar sær at flyta til Føroyar í summar, sum hevur íbúð ella hús í Keypmannahavn ella har um vegir. Eg havi hús í Havn og ætli mær niður at vera frá 01.08.02. Kunnu vit tosa saman um evt. umbýting?
Tlf. 317936

HØVUDSTAÐURIN
ella Runavík. Kvinna við einum barni søkir íbúð. Er røkin og hvørki roykir ella drekkur.
Tlf. 316016

GULA HÚSIÐ Í MYKINESI
til bólkar eins væl og til einstaklingar, allir hentleikar, sigið frá í góðari tíð.
Tlf. 332614, 225090 ella 318468

HÚS Í SKOPUN
Hús ynskist til leigu í Skopun í sambandi við familjufest tann 29.-30. juni.
Tlf. 316992

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt par við einum barni, sum søkja eina íbúð skjótast gjørligt, helst í Eysturoynni. Max 3.500 kr. við el og hita.
Tlf. 226090 ella 444447

TRÚGVANDI
friðarlig fólk – mamma og barn – ynskja íbúð í Havn. Havi fast arbeiði, gjaldið rættstundis. Max. 4.500,- við øllum.
Tlf. 316219

HÚS ELLA ÍBÚÐ
ynskist í miðstaðarøkinum til trý ung, friðarlig fólk, sum ikki roykja og drekka. Fara væl um, og gjalda heilt sikkurt til tíðina.
Tlf. 227228 ella 213468

ÍBÚÐ YNSKIST Í KBH. Í 14
Hjún leita eftir íbúð í Kbh. dagarnar 30. mai–14. juni. Ringið tlf. 311849
e-mail: niclas@reproz.com

TIL LEIGU
Hús í Hoyvík til leigu frá 1. juli
e-mail: olavur@faith.edu.ph

Dýr

EIN
8 mánaðar gomul tík verður, vegna serligar umstøður, latin djóravini. Hon aktar væl, er reinlig og ikki so stór.
Áhugaði kunnu ringja á 228256

KETTLINGUR
Ein svartur, fittur kettlingur verður latin djóravini. 8 vikur og reinligur.
Tlf. 315133

KETTLINGUR
Ljósagráur (frensur) av angora ætt. Hann er 8 vikur gamal og klárar at heinta.
Tlf. 311612

KETTLINGAR
Tveir fittir kettlingar verða latnir djóravinum. Eru 8 vikur gamlir og eru reinligir.
Tlf. 310071 ella 255090

KETTLINGAR
Vit hava 3 sera fittar kettlingar. Teir eru reinligir og duga at leppa. Teir eru undan mammu, ið er sera rólig og barnavinarlig.
Ring 315548

KANIN
Svørt/hvít kanin verður latin djóravini.
Tlf. 319190

TIL SØLU
Tveir undulátar til solu við búri.
Tlf. 319068

TIL SØLU
Tveir undulátar til sølu, tann eini er tamur, búr og tilhoyr fylgir við. Vinarliga ringið eftir kl. 16.00.
Tlf. 224729 ella 311837

HUNDAHVØLPUR
Ein sera fittur hundahvølpur, 7 vikur gamal, undan lítlum hundi verður latin djóravini.
Tlf. 213552

TIL SØLU
Undulater sælges.
Tlf.228058

TIL SØLU
6 Border Collie hundahvølpar av góðum seyðahundaslagi til sølu.
Tlf. 421600, e. kl. 18, ella 211600

HUNDAHVØLPUR
Sera fittur hvølpur (tík) leitar eftir nýggjum heimi.
Tlf. 441863 - 227393

HEY!
Er nakar, sum hevur tvey heimalomb at lata mær?
Tlf. 448990

HUNDUR
Ein 1 ára gamal Golden retriever verður seldur til djóravin sum hevur góðar umstøður. Ring eftir kl. 16.00
Tlf. 226579

HUNDAHVØLPUR
Ein 16 vikur gamal hundahvølpur verður vegna serligar umstøður latin djóravini.
Tlf. 423552

PUDDILHVØLPUR
ynskist.
Tlf. 256785, e. kl. 15

YNSKIST
Ein hon dvørghamstrari ynskist til keyps.
Tlf. 228256

HVØLPUR YNSKIST
Vit ynskja okkum ein hundahvølp av lítlum og góðsligum slag. Vit vilja fegin hava hvølpin so ungan sum til ber.
Tlf. 321134 eftir kl. 17

KETTLINGAR
Svartur kettlingur og svartur vitt hvítum labbum ynskja gott heim.
Tlf. 217801

KANIN
Spøk kanin, 1 ára gomul, við stórum búri, verður latin djóravini.
Tlf. 310774

KETTLINGAR
Tveir kettlingar verða latnir djóravinum, lagdir 11. apríl.
Tlf. 314246 e. kl. 14

HEY!
Er tað nakar, sum hevur eitt heimalamb at lata mær.
Tlf. 251428

Fundir

FØROYA ASTMA/ALLERGIFELAG
hevur eykaaðalfund í kjallaranum í MBF húsinum 8. juni kl. 14.00. Evni: Val av nevnd.
Nevndin

AÐALFUNDUR
Altjóða barnalegur (CISV) hevur aðalfund 16. juni kl 14.
Aðalfundurin verður á Føroya Studentaskúla. Skrá sambart lógum felagsins.
Nevndin

FØROYA FELAG
MÓTI KRABBAMEINI. Skipað verður fyri hugnaløta fyri fólki, sum hava fingið lagt bløðru ella tarm út á síðuna, og fyri fólki við bekken-reservoir og teirra avvarðandi. Stomisjúkrasysturin Gitte Daugbjerg úr Danmark heldur fyrilestur. Hugnaløtan verður á Hotel Hafnia mánadagin 27. mai kl. 15-17. Tekning hjá Føroya Felag Móti Krabbameini tlf. 317959, fartelefon 217959 teldupostur
ffk@post.olivant.fo

Húsarhaldstól

VEGNA FLYTING
selja vit okkara vaskimaskinu. Undir 1 1/2 ára gomul, fyri 2.500 kr.
Tlf. 251287 eftir kl. 17

FRYSTARI TIL SØLU
Gram frystari 500 l.
Tlf. 316562

Innbúgv

SOVIBRIKS TIL SØLU
Sovibriks – springmadrassa – við tveimum skuffum 350 kr.
Tlf. 258543

SOFASETT
Vegna flyting selja vit eitt sofasett, 3+1+1 lágir, vínreyðir leðurmøblar. 2500 kr.
Tlf. 251287 eftir kl. 17

TIL SØLU
Tvær nýggjar box madrassir, 90x200, við einari toppmadrassu, 5x180x200, til solu fyri 1.700 kr. Nýprísur 3.600 kr.
Tlf. 322025 - 263982

MØBLAR TIL SØLU
Dagligstovumøblar: Massivt borð við kaklum, sofa og tveir stólar og eyka djúpur stólur. Spísistovumøblar úr eik: Runt borð við 6 stólum, hornaskáp og reolveggur úr palisander.
Tlf. 251137

TIL SØLU
Grábrúnt sofasett, 1+2+3, til solu fyri 1.000 kr.
Tlf. 315991

TELDUBORÐ
1 ára gamalt hornteldubord úr bók til solu vegna plásstrot. Sær út sum nýtt.
Tlf. 373856

BRIKS
til barnakamar til solu fyri 400 kr.
Tlf. 314740

HORNASOFA TIL SØLU
5-pers. brún leður hornasofa til solu fyri 7500 kr.
Tlf.213835 ella 315741

TIL SØLU
Ein so gott sum nýggj song v/ boksmadrass 200x140 cm. Til solu vegna flyting fyri 3000.- kr. (nýprísur 6500 kr.)
Tlf. 264891

Lutaseðlar

KFUM Í HAVN
Hesi hava vunnið á lutaseðli til frama fyri KFUM í Havn.
1) 7837, 2) 1948, 3) 5094, 4) 9972, 5) 1522, 6) 8997, 7) 5557, 8) 2844, 9) 4365, 10) 4633, 11) 0096.
Vinningarnir fáast við at ringja tlf. 314139, 311824 ella 211824. KFUM takkar hjartaliga fyri stuðulin.
KFUM

NEYTALORTAKAPPING
hjá Fimleikarfelagnum FOK 18. mai: Eigarin av teigi nr. 458 vann tarvin. Vinnarin er funnin. Takk fyri stuðulin.
Nevndin

LUTASEÐLARNIR
sum vóru trektir fyri KFUM og -K skótarnar í Kollafirði og KFUM skótarnar í Hvalvík eru ikki allir avheintaðir.
gávukort F.K. nr. 0454,
gávukort Thomas Dam á Hálsi nr. 2155,
gávukort Billutir nr. 3511,
gávukort Skótabúðin nr. 2080.
Vinningarnir falla aftur til skótarnar um teir ikki eru avheintaðir innan 3. juni 2002. Vinnararnir verða bidnir um at ringja til
tlf. 421061 ella 421628

FRÁ HEILAFELAGNUM
Lutaseðlarnir, seldir í SMS í sambandi við tiltakið 11 mai:
appelsingulur nr. 05434,
appelsingulur nr. 05414,
ljósareyður nr. 2518,
ljósareyður nr. 2509. Vinningarnir fáast við at ringja 317772.
Heilafelagið

**